gult12 cyan12 magenta12 svart12



SKEMT 2000

fæst í sølubúðunum kring alt landið
Kostnaður 120,-






Enn er møguleiki fyri at ogna sær allar
12 SKEMT bøkurnar í signeraðum eintøkum
fyri ein samlaðan prís á einans kr. 650,-

Bíleggið nú og tit fáa tær sendandi beinanvegin. Ringið til Sosialin á tlf. 31 18 20

Sosialurin - 311820

gult13 cyan13 magenta13 svart13

ítróttur

Nr. 91 • týsdagur • 15. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Breiddin er ov lítil



*Tað verða sett ov fá met, og tað eru ov fáir persónar, sum seta metini, sigur nýggi landsliðsvenjarin, sum als ikki tykist nøgdur um støðuna hjá føroyskari svimjing í løtuni*
*Mynd: SJ*

**Petur Heðin á Fløttu, sum júst er settur sum venjari hjá svimjilandsliðnum, var ikki nøgdur við tað, sum hann sá, nú FM varð svomið um vikuskiftið. Ov fá met verða sett, og breiddin í toppinum er ov lítil, heldur hann**

SVIMJING
*Jákup Mørk*

Føroyameistarakapping í svimjing var um vikuskiftið, og sjálvandi var spenningurin stórur millum føroysku svimjifólkini. Fyrst og fremst snúði hesin seg kanska um, hvør mundi fara at vinna ymsu gullmerkini, men tað vóru tó ikki øll, sum høvdu hetta í huga. Nú bert tveir mánaðir eru eftir, til farið verður í holt við Oyggjaleikirnar á Isle of Man, hevur Svimjisambandið júst sett nýggjan landsliðsvenjara, og hjá hesum mundi FM-kappingin ikvaleyst vera eitt sera kærkomið høvi at hyggja nærri at teimum svimjarunum, sum fara at umboða Føroyar.

## Ikki nøgdur

Nýggi landsliðsvenjarin er Petur Heðin á Fløttu, sum sjálvur hevur svomið nógv heiðursmerki heim til Føroya. Tá vit sunnukvøldið spurdu hann, hvussu hann var nøgdur við tað, sum hann hevði sæð undan vikuskiftinum, var fyrsta svarið, at hann sum so ikki var nøgdur.

- Tikið yvir ein kamb, so kann eg ikki siga meg vera nøgdan. Størsti trupulleikin er fyrst og fremst tann, at breiddin í svimjingini er alt ov lítil. Tað eru bert nakrir fáir svimjarar, sum imponeraðu eitt sindur, men kortini vil eg siga, at eg fegin hevði vilja sæð meira frá teirra síðu.

- Í heila tikið eri eitt sindur vónbrotin. Tað verða sett alt ov fá met, og so er tað aftur hatta við manglandi breiddini. Tað eru nevnliga alt ov fáir svimjarar, sum kappa av metunum, og tað er nakað, sum nógv arbeiði skal leggjast í at betra.

Spurdur, um hann sum landsliðsvenjari fær gjørt nakað við hendan trupulleikan, sigur Petur Heðin, at tað fær hann kanska ikki í løtuni.

- Til OyL hesa ferð fái eg so ikki gjørt nakað sum helst, og tað er helst eisini ivasamt, um vit fáa broytt nakað til teir, sum koma um tvey ár. Byrjast skal snøgt sagt frá grundini, og so mugu tey talentini, sum koma, bara sláa ígøjgnum so hvørt, heldur hann.

- Vit mugu fáa fleiri fólk at svimja, og eisini gera nakað, soleiðis at hesi støðast betri í ítróttini. Svimjingin hevur seinnu árini mist nógv fólk til eitt nú kappróður. Talan er kanska um svimjarar, sum í árinum millum OyL vilja royna okkurt annað, og so verður tað brádliga tikið framum. Møguliga skuldi verið arbeitt við at fingið eina fasta avbjóðing inn í hesi árini, men tað er so nakað, sum vit mguu tosa um komandi tíðina.

Petur Heðin heldur annars eisini, at svimjararnir yvirhøvur hava ov fáar avbjóðingar at taka til. Sjálvur var hann t.d. í USA á svimjiskúla, eins og fleiri aðrir føroyskir svimjarar vóru tað um hetta mundið. Hann veit ikki at siga, um hetta er orsakað av væntandi áhuga ella ov lítlari upplýsing um møguleikar hjá svimjarum, men í øllum førum heldur hann hetta kundi bøtt um støðuna við svimjingini.

## Ræður um at støðast

Sum nevnt omanfyri, so er Petur Heðin júst settur í venjarastarvið, hóast tað bert eru tveir mánaðir til OyL, og júst sessurin sum landsliðsvenjari, hevur verið sera heitur seinnu árini. Svimjisambandið hevur havt fleiri útlendskar persónar í starvi, men hvørja ferð tykist tað, sum um eitthvørt í samstarvinum ikki riggar sum tað skal.

- Tað hevur í øllum førum verið ein stórur trupulleiki, at útskiftingin hevur verið somikið stór. Ein trupulleiki hevur í øllum førum verið, at talan er um útlendingar, sum koma hendan vegin, og sum kanska ikki ætla sær at vera meira enn eitt ella tvey ár í Føroyum. Ístaðin fyri at nýta hesar á svimjilandsliðnum, áttu tað heldur at verið feløgini, sum gjørdu nýtslu av teimum, soleiðis at teir bert vóru við í venjingini har.

- Tá skiftið á venjarasessinum er somikjið stórt, viðførir tað eisini, at landsliðsvenjarin ikki kennir einstøku svimjararnar nóg væl, og møguleikin at arbeiða langsiktað er burtur. Sum venjari skalt tú helst kenna einstøku svimjararnar sera væl. Vita hvat kanska kann órógva undir eini kapping, ella hvat kann stimbra, og alt hetta er nakað, sum tekur tíð. Harafturat má landsliðsvenjarin eisini átaka sær at taka atlit til tey, sum sýna góð evni, og sum møguliga verða aktuell til svimjilandsliðið um nøkur ár.

## Fáa frið á

Tá vit at enda spyrja Petur Heðin, hvørjar fremstu ætlanir hansara sum landsliðsvenjari eru, svarar hann, at tað nú ræður um at fáa arbeiðsfrið kring landsliðið.

- Tað er so tað týdningarmesta, men afturat tí, skal so eisini eitt langtíðararbeiði setast ígongd, soleiðis at vit aftur kunnu hækka støðið á svimjingini.

- Umframt tað, so skal eg so eisini hava eitt slag av yvirblikki yvir, hvussu støðan er úti í ymsu feløgunum, og her er sjálvandi týdningarmikið at fáa ein góðan dialog við ymsu feløgini. Tað er so í øllum førum nakað, sum eg ætli mær at leggja meg eftir.

Og stendur tað til Petur Heðin, so verður friður kring landsliðið nú. Í øllum førum hevur hann so avgjørt ongar ætlanir um at steðga innan stutta tíð, tá vit spyrja hann, um hann ætlar sær at siga longri, enn undangongumenn sínir.

- Ja, tað er so avgjørt mín vón, at tað fer at bera til. Tað ræður sjálvandi um at samskipa venjing og arbeiði, og kann eg tað, so ætli eg mær so avgjørt at halda á í starvinum, sigur Petur Heðin á Fløttu at enda.